## VIÐMERKINGAR

# Mentanargrunnurin fer ikki at steðgað mær at skriva

ÓLAVUR Í BEITI
rithøvundur



Las viðmerkingina hjá Jústinus L. Eidesgaard, høvundi, við sera stórum áhuga, og eg taki so hjartaliga undir við tí hann førir fram, at síðan Rói Paturson gjørdist formaður í Mentanargrunninum hava so at siga bert yrkjarar fingið pening úr grunninum. Og eg skal eisini viðmerkja, at hetta er ikki nøkur nýggj hugsan, men hetta havi eg hugsað nú í nøkur ár. Og tað er ikki tí at so fáir rithøvundar hava søkt, eg veit um fleiri!

Men eg taki ikki undir við Jústinus L. Eidesgaard, tá hann hálovar nýggju bókini hjá Carl J Jensen, tí eg eri púra ósamdur. Hetta er so at siga ein toygd »Rúm« sum seldi nøkur fá eintøk, sami uppgjørdi fjantuti heilaspuni sum tann bókin var, og tað er grátuligt at lesa í greinini hjá Jústinus L. Eidesgaard at Mentanargrunnurin hevur stuðlað sovorðnari óhumsku við uml. 560.000 krónum.

Ein bók sum eg veit Mentanargrunnur Studentafelagsins ikki troystaði sær at geva út!

Men lat tað fara, tí eg síggi á listanum, sum Jústinus hevur viðlagt, at har er so mangt annað, so tað kemur ikki óvart á nakran, at so nógvur peningur fer á skeivar hendur, tí at Mentanargrunnurin síðan Rói Paturson gjørdist formaður, stuðlar bert teimum sum formaðurin er mentanarfaðir at.

**Kríggj**

Nú Jústinus L. Eisdesgaard kemur fram við hesi fráliku lýsing av málinum um seg sjálvan og samanber við aðrar, so ørminnist eg júst hvat hendi, tá Jústinus søkti fyrstu ferð. Tá hann hevði ætlanir at fara undir bókaróðina »Kaj« og søkti um 3 ára starvsløn úr Mentanargrunninum.

Sum tað gongur fram av listanum hjá Mentanargrunninum, so fekk ein yrkjari 3 ára starvslønina tá, og eg minnist so væl enn, hvat svar eg fekk, tá eg tosaði við ein lim í Mentanargrunninum eftir henda fund.

Eg mátti siga, at eg øtaðist at hoyra slíka grundgeving, at hesin yrkjarin varð valdur, tí grunnurin bar ótta fyri, at fingu Carl J Jensen ella Hanus Kamban 3 ára starvlønina tá, ja so hevði komið kríggj teirra millum í bløðunum!

Hetta var á fyrsta sinni, at slíkar starvslønir skuldu latast, og tá var mikil spenningur um, hvør fór at fáa ta stóru lønina, og so valdi Mentanargrunnurin henda yrkjaran, tí Mentanargrunnurin bar ótta fyri, at Carl J Jensen og Hanus Kamban fóru at klandrast í bløðunum, fekk annar teirra 3 ára starvslønina!

Sovorðið havi eg ongantíð hoyrt fyrr!

Eg mundi dottið upp afturá á skák, tá eg hoyrdi henda persón sipa til ein nevndarlim við hesi grundgeving!

Og so søgdu teir: Var tað ikki eitt gott val?! At velja henda yrkjaran!

Altso, sum var hetta eitt løgtingsval og ein flokkur hevði fingið stóra framgongd og limirnir gingu og klappaðu hvør øðrum og søgdu: Var tað ikki eitt gott val!

Tað var so ikki verkætlanin hjá hesum yrkjara sum hevði nakran týdning, men Mentanargrunnurin sum valdi henda persónin at fáa 3 ára starvsløn, tí annars fóru tveir aðrir umsøkjarar at kríggjast í bløðunum..... tað var orsøkin!

**Ikki øvundsjúka**

Nei Jústinus L Eidesgaard, tú ert ikki øvundsjúkur, men eg takki tær fyri at hava gjørt hetta research og at hava skrivað hesa viðmerking, so vit kunnu fáa størri innlit í, hvat gongur fyri seg í Havn!

Tí Mentanargrunnurin gevur ikki starvslønir eftir umsóknini!

Og síðan Rói Paturson gjørdist formaður í grunninum eru tað næstan bara yrkjarar, sum fáa tær stóru lønirnar. Og eg veit at soleiðis er, tí eg veit um aðrar høvundar, sum eisini hava søkt um starvsløn men sum einki hava fingið!

Ikki 1 mánað, enn minni tveir!

**Eingir pengar**

Hatta brævið sum Mentanargrunnurin sendir út um at so lítið av peningi er í grunninum, er eitt tað frekasta brævið eg havi hoyrt um.

Hvat ólukkan billar nevndin sær inn at senda eitt sovorðið bræv til tey sum ikki fáa? Tá vit nú síggja svart upp á hvítt, at ein persónur hevur fingið 800.000 krónur – meðan hann hevur starvast sum blaðmaður á Fregnum – og kanska eisini havt aðrar inntøkur, so fái eg ikki annað sagt enn, at mín virðing fyri Mentanargrunninum er fallin á eitt sera lágt støði!

Sum rithøvundur at fleiri bókum og eisini útgevari og útgivið saman við øðrum – helst fleiri bøkur enn bæði Carl J Jensen og Jústinus L Eidesgaard og Rói Paturson tilsamans – fari eg at heita á mentamálaráðharran um at skifta handa formannin út úr Mentanargrunninum sum skjótast, tí hann er skaðiligur at hava í grunninum, tá hann misbrúkar okkara pening á sovorðnan hátt og roynir at køva neistan hjá mongum høvundi við slíkari framhaldandi provokatión!

**Ikki umbiðin nú**

Eg sá hatta navnið Sunleif Rasmussen aftur og aftur á listanum, og nú hoyri eg frá einum limi í Mentanargrunninum, at Mentanargrunnurin stuðlar honum:

TÍ HANN ER IKKI SO NÓGV UMBIÐIN LONGUR!!!!!

Harra mín Gud, ein maður sum ikki dugir at skriva eitt lag, hvussu kann hann vera umbiðin?

Og hetta er so aftur eitt prógv um, at sum Mentanargrunnurin sær út nú, so má mentamálaráðharrin seta formannin frá sum skjótast so aðrir rithøvundar og yrkjarar og smiðir av øllum handa slagi, sleppa framat og vit fáa elvt til heldur enn køvt!

Tí sum støðan er nú, so skapar nevndin í Mentanargrunninum ikki annað enn klandur og hatur millum mentanarfólk, og tað er ongastaðnis nevnt í lógini um henda grunn, at hann skal elva til slíkt!

Tvørtur ímóti skal grunnurin eggja til! Stimbra!

**Hugur**

Eg havi verið við at givið 2 bøkur út síðan 2001, og ein nýggj er á veg nú og vónandi verður hon útgivin um nakrar fáar mánaðir. Tann eina kostaði 120.000 krónur at prenta og kom hon út í 2003!

Og eg takki Jústinus L Eidesgaard fyri at hann nevndi meg í síni grein so øll kunnu síggja, at tað er ikki nøkur starvsløn sum hevur borið kostnaðin av mínum virksemi seinnu mongu árini, men hugurin til hetta virksemi!

Og Mentanargrunnurin við Róa Patursyni á odda fer ongantíð at køva hesum hugi!

Skal bara hasin gjeldi orðavavsturin hjá Carl J Jensen koma út, sum Mentanargrunnurin stuðlar so ovurmáta, so forbarmi okkum! Men kanska vit skilja tað eitt sindur betur, tá formaðurin í Mentanargrunninum er gubbi at soninum hjá hesum vælbjargaða høvundi!

# Muslimar og yvirgangur

RAMON BENNETT
Jerúsalem



**Altjóða islamiskur yvirgangur verður vanliga framdur av Wahhabi-muslimum, skrivar Ramon Bennett**

Ein Wahhabi-muslimur er annaðhvørt ein Sunni-muslimur ella ein Shia-muslimur!

Wahhabisma er sambært Islam ein strong tulkan av Koranuni, ein rørsla, ið er stovnað av Muhammad ibn Abd al-Wahhabi (1703-1792), sum í dag hevur nógvar muslimsk viðhaldsfólk um allan heim.

Meginparturin av teimum 20 milliónum muslimum í Saudi Arabia eru Sunni-muslimar. Umleið 12 milliónir av teimum eru Wahhabistar sum eisini prófvestir hví Saudi Arabia er landið, ið fostra flest, sum luttaka í altjóða yvirgangi.

Bin-Laden er bert *ein* muslimur av tíggjutals milliónum muslimum sum eru trúgvir Wahhabistar. Síðani álopið á USA hin 11. september standa túsundavís av bin-Laden klovningum tilreiðar, eggjaðir av sama brennandi áhuga fyri islam sum bin-Laden hevur víst. Fjøldir av fólki hava síðani tikið við islamsku trúnni, bergtiknir av ágrýtni, árræði og dirvi bin-Ladens og hansara al – Quida yvirgangsfelagskapi. Islam hevur íframgongd. Islam fer at floyma inn yvir allar heimsins tjóðir sum ein flóðalda, um heimsins leiðarar halda á fram við teirra støðuleysu og politisku lyfran fyri Islam.

Koranin (Qur´ran) er málgagn hjá arabiskar monnum tá tað snýr seg um buking av kvinnum. Fyri at verja muslimskar menn, sum liva í vesturlendskum londum, ímóti ákærum um kroppsligan yvirgang ímóti konum sínum, hevur ein muslimskur imamur Mohammad Kamal Mustafa sum býr í Fuengirola í Spania, skriva eina bók sum skal læra islamskar menn, "Hvussu best er at buka konurnar uttan at geva merkir." Spanskar kvinnurørslur stevndu Mustafa fyri rættinum í einum rættarsali í Barcelona og nevningarnir funnu hann sekan í at eggja til harskap ímóti kvinnum. Fyri ikki at vekja vreiðina hjá muslimska samfelagnum í Spania, fekk Mustafa bert fimtan mánaðar treytaðan dóm.

Islam er miskunnarleyst og ósiviliserað av tí at andin aftanfyri Islam er av tí ónda. Vit øll eru vitni til 11. september ræðuleikan, morðini í skúlanum í Beslan, sjúkligu video- sendingarnir har muslimar høggja høvðini av livandi fangum í Pakistan og Irak.

At vera ein Wahhabi muslimur er at liva sum Koranin lærir, Sheik Omar Bakri Muhammed váttaði yvir fyri einum blaði í Portugal Publica Magazine seinasta apríl. " Vit gera ongan mun á vanligum borgarum ella hernaðarligum, a ósekum og sekum, lívið hjá einum vantrúgvandi hevur einki virði, tað er ikki heilagt.... yvirgangur er lógin í hesari øldini. Yvirgangur er lógligur".

Vegna náttúru Islams má frælsið hjá muslimun sum búgva í vesturheiminum avmarkast. Bremsa má setast á muslimsku tilflytingina til vesturheimin, tíggjutals milliónir muslimar hava fingið loyvi at flyta til vesturheimin, hundraðtúsundatals av muslimum hava fingið loyvi til at flyta til vesturheimin fyri at giftast, yvirvøld í vesturheiminum mugu taka bindið frá eygunum viðvíkjandi hesum.

At senda ógiftar menn til vesturheimin er eftir eini miðvísari ætlan fyri at breiða út Islam og Islamska læru. Tann Islamska sharia-lógin sum er byggir á Koranina, sigur at um ein sum ikki er muslimur giftist við einum muslimi, má hesin taka við islamiskari trúgv. Tekur ein muslimur við aðrari trúgv, so skal hann lata lív.

Veruleikin er tann, at ikki allir muslimar eru yvirgangsmenn, men tað er ein sannroynd, at næstan allir yvirgangsmenn eru muslimar.

Hetta er ikki bara ein dreymur hjá Chehnya um ein Islamskt ríki í Kaukasus ella ein Indonesiskur/Filippinskur muslimskur dreymur um ein stóran islamiskan stat í suður-eystur Asia, somu muslimsku hugsanir eru á veg í Kina, Kashmir, Ísrael, Nigeria, Sudan, Kenya og til nógv onnur lond. Tað er bert ein spurningur um tíð áðrenn muslimar sum búgva í vesturheiminum vendasæropinberliga ímóti vesturheiminum í stórum tali.

Eg havi staðfesting frá týskum og bretskum islamskum tíðarritum. Týskir muslimar siga at "Týskland er okkara," og "Tað er eingin grund fyri hví Týskaland ikki kann vera fullkomliga islamiskt við endan av 2020." Bretskir muslimar eru eggjaðir til at "gera seg til reiðar til eina islamska framtíð í Bretlandi." Um allan Vesturheimin, Amerika, Bretland, Frakland, Týskland, Italia, Holland o.s.fr. eru muslimar handtiknir fyri at fremja yvirgangsálop. Tað er bara ein spurningur um tíð.

Flestu leiðarar í vesturheiminum, við bert fáum undantøkum, kína, sum heild, muslimsku samfeløgunum og Islam, eftir hárinum.

Undirritaði vil sipa til Winston Churchill, sum segði: "Ein óvirkin er ein, sum fóðrar eina krokodillu og vónar at hon etur seg síst."

